Álit

í

løgtingsmáli nr. 82/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd (Barnaverndarlógin) (Fráboðan um børn við bústaði í Danmark, stuðul til foreldramyndugleikan, heimild til barnaverndarnevndina at taka avgerð um ávís viðurskifti hjá barninum og heimild at flyta barnaverndarmál millum barnaverndartænastur)

Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum, hevur lagt málið fram 7. mars 2024, og eftir 1. viðgerð tann 18. mars 2024 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 11. og 18. apríl og 2. mai 2024.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við umboð fyri Familjuhjálpina, Barnaverndarstovu Føroya, Fosturforeldrafelagið og landsstýrismannin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóna Nolsøe Joensen.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Nevndin tekur sum heild undir við uppskotinum. Tó metir nevndin, at tað eigur at vera ein møguleiki at kæra eina avgerð um at flyta viðgerðina av einum barnaverndarmáli frá eini barnaverndartænastu til aðra. Ein slík avgerð er at meta sum eitt týðandi inntriv í rættarstøðuna hjá m.a. foreldrunum í einum barnaverndarmáli.

Nevndin setir tískil fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 1 verða nr. 7 og 8 strikað.

Viðmerkingar:
Við broytingini verða avgerðir um at flyta eitt barnaverndarmál úr eini barnaverndartænastu í aðra barnaverndartænastu fevndar av § 65, stk. 1, og møguleiki verður harvið at kæra hesar avgerðir.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur nevndin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 7. mai 2024

Jørgen Niclasen formaður	Liljan Weihe næstforkvinna	Kaj Leo Holm Johannesen
Johan Dahl	Árni Skaale	Hans Jacob Thomsen
	Súsanna Bertholdsen	